Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Ymisk koronutilmæli

Spurningar:

1. Eru ymisk koronutilmæli galdandi fyri ávikavist kirkjur, samkomur, mentanarlív og ávísar ítróttargreinar?
2. Hvat heldur løgmaður um, at ítróttartiltøk verða hildin innandura fleiri dagar á rað við fleiri hundrað áskoðarum?

Viðmerkingar:
Í skrivandi stund eru 1787 tilburðir av koronu staðfestir í Føroyum, og í meðal eru í løtuni 256 tilburðir um dagin.

Higartil í ár hava ongar guðstænastur verið hildnar, tí fólkakirkjan hevur avlýst hesar fyri at halda koronutilmælini um ikki at savna fleiri enn 100 fólk innandura.

Mentanartiltøk eru eisini avlýst ella avmarkaði, tí tilmælini verða hildin. Til dømis sæst á heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum, at tá fleiri enn 100 fólk eru til eitt tiltak, steðgar atgongumerkjasølan, og at fólk so mugu seta seg á bíðilista fyri at fáa atgongumerki, sum møguliga gerast tøk.

Samstundis frættist í miðlunum um dagarnar, at ítróttartiltøk eru í fleiri dagar á rað, har fleiri hundrað áskoðarar eru savnaðir innandura.

Fólk tykjast ørkymlaði um, hvørji tilmæli eru galdandi, og tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 14. januar 2022

Beinta Løwe Jacobsen